UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **26. september 2022**
Tygara ref**.:**
Máltal**.: 21/08502-152**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-032/2022 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni, um ábyrgd av serskúlaflutningi.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvørjar flutningstænastur kommunustýrið skal seta í verk fyri at lúka kravið í serskúlalógini um at bera kostnaðin av næmingaflutninginum?

2. Hvør myndugleiki skal ávikavist skipa fyri og gjalda fyri næmingaflutning í teimum førum, har næmingurin hevur so serligan tørv, at næmingurin ikki kann ferðast saman við øðrum, t.d. við Bygdaleiðum ella aðrari busstænastu?

3. Ætlar landsstýrismaðurin at taka stig til eina meira samhaldsfasta flutningstænastu, har landið átekur sær næmingaflutningin á serskúlaøkinum?

Svar

Til 1: Tær flutningstænastur, ið kommunustýrið hevur skyldu til at seta í verk sambært serskúlalógini, eru tær somu, sum skulu setast í verk fyri næmingar, sum ganga í fólkaskúla uttan fyri teirra egnu bústaðarkommunu, sbrt. § 11, stk. 3 í løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla, sbrt. § 33 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan. Hetta merkir millum annað, at kommunustýrið skal skipa fyri flutningi av næmingum millum heim og (ser)skúla, ella samsýna næminginum útreiðslur til egnan flutning, tá ið ikki ber til at vísa til almennar ferðslumiðlar.

Viðvíkjandi júst hvørjum flutningsháttí, ið kommunustýrið hevur skyldu til at bjóða næmingi, er at siga, at hetta í størsta mun veldst um eina ítøkiliga meting av tørvinum hjá einstaka næminginum, ið kommunustýrið noyðist at gera í hvørjum einstøkum føri, og kann hetta m.a. fevna um bussar ella hýruvognar, um ongir almennir ferðslumiðlar eru egnaðir.

Til 2: Til ber at staðfesta, at kommunan skal skipa fyri og gjalda fyri flutning, eisini í teimum førum, har næmingurin ikki kann ferðast við Bygdaleiðum ella aðrari busstænastu.

Til 3: Hesin spurningurin er ikki viðgjørdur enn, men møguleiki er fyri, at hann kann verða tikin upp í sambandi við endurskoðanina av fólkaskúlalógini í ár.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður